KAPPINGIN UM TEY 18 PLÁSSINI ER Í GONGD

Um eina góða viku fer Allan Simonsen at taka út 18 spælarar til landsdystin móti Slovakia

Føroyska A-landsliðið í fótbólti hevur fýra landsdystir eftir at spæla í ár, og um eina góða viku fer Allan Simonsen, landsliðsvenjari, at taka út teir spælararnar, sum hann skal brúka til dystin móti Slovakia.

Nú er landskappingin júst farin í gongd, og landsliðsvenjarin fer helst at bíða sum longst at kunngera sítt lið, hetta fyri at síggja hvussu hansara spælarar eru fyri, og um hann skal gera broytingar.

Gongur onkur og droymir um eina kollvelting á landsliðnum, so verður hann skuffaður, tí landsliðsvenjarin hevur gjøgnum sína tíð vist, at hann fyrst og fremst setur sítt álit á teir somu spælararnar – teir sum hava royndir, og teir sum hann kennir.

Soleiðis verður eisini hesaferð.

Men sjálvt um hetta er niðurstøðan, so kemur venjarin at velja millum spælarar.

NÓGVIR AT VELJA MILLUM Í VERJUNI

Málmansplássini vera mannað við Jens Martini Knudsen og Jákupi Mikkelsen, og lítið er at ivast í, at Jens Martin eigur fyrsta plássið. Hann hevur staðið væl seinastu dystirnar, og hevur størri royndir enn klaksvíkingurin í Herfølge.

Í verjuni eru fleiri ivamál, og har koma onkrir spælarar, sum seinastu dystirnar hava verið við, helst at sita heima hesaferð.

Óli Johannesen verður sum vant spælarin, sum skal stýra verjuni frá sweeparaplássinum, men hvørjir fara at spæla frammanfyri hann, er stóri spurningurin. Millum evnini eru Jens Kristian Hansen, Janus Rasmussen, Andreas F. Hansen, Fróði Hansen, og nógv er sum týður uppá, at Allan Joensen fer at fáa kjansin aftur.

NÝGGIR VIÐ Í KAPPINGINI

Á miðvøllinum er ið hvussu er vist, at nýggjur maður skal við fyri Magna Jarnskor.

Í høgra borði verður Henning Jarnskor helst settur at spæla, meðan Øssur Hansen er upplagt val til vinstru síðu.

Á sentrala miðvøllinum kunnu fleiri spælarar setast. Julian Johnson, Allan Mørkøre, Jan Dam og Jens Kristian Hansen standa fremst í røðini, men hvørjir spæla har, veldst eisini um hvørjar venjarin setur í verjuna.

Millum nýggju kappingarneytarnar til pláss á miðvøllinum, ella ið hvussu er í hópinum, munnu Djóni N. Joensen, sum er komin fyri seg eftir langan skaðasteðg, og Rúni Nolsøe, sum hevur spælt fram úr væl fyri HB í ár, metast.



At Todi Jónsson aftur er tøkur, er stórur styrkur

TODI TØKUR AFTUR

Nú Todi Jónsson aftur er tøkur til landsliðið, er kappingin um fremstu plássini á liðnum minni.

Spurningurin er um Allan Simonsen vil spæla við einum spælara á toppinum, ella vága skinnið, og senda tveir mans fram í oddin.

Hetta seinna hevur annars verið siðvenja hjá dananum, og velir hann aftur hesafeð at gera tað, er eingin orsøk til at gera nakað annað, enn einaferð at seta Todi Jónsson og Jan Allan Müller saman í álopinum.

Jens Erik Rasmussen er eisini við í kappingini, og eftir flotta málið í Jugoslavia, hevur John Petersen eisini vist, at dugur er í honum. Sunnudagin vist hann góðan form, og gjørdi trý av málinum hjá GÍ, tá teir vunnu stórt á FS Vágum. Uni Arge hjá HB má eisini metast millum tríggjarnar til eitt av álopsplássunum.

Topskjúttin í føroysku landskappingini, Kurt Mørkøre, gav fyrr í ár avboð til landsliðið vegna arbeiðsumstøður, men tað hongur í leysari luft, um hann ger comeback í heyst.

Aðrir spælarar hava í kappingini í ár gjørt seg galdandi, men royndirnar siga, at pláss er ikki fyri nógvum nýggjum spælarum, og at landsliðsvenjarin fyrst og remst dúvar uppá teir spælarar, sum hava roynt seg áður, og sum hann kennir.

ek

LANDSLIÐSEVNINI

MÁLMENN

Jens Martin Knudsen	GÍ
Jákup Mikkelsen	Herfølge Boldklub
Kaj Leo Johannesen	HB

VERJUSPÆLARAR

Óli Johannesen	B36
Jens Kristian Hansen	B36
Hans Fróði Hansen	B68
Janus Rasmussen	GÍ
Andreas F. Hansen	HB
Allan Joensen	KÍ

MIÐVALLARSPÆLARAR

Djóni N. Joensen	B36
Julian Johnson	B36
Øssur Hansen	B68
Henning Jarnskor	GÍ
Rúni Nolsøe	HB
Harley Bertholdsen	KÍ
Allan Mørkøre	KÍ
Jan Dam	KÍ

ÁLOPSSPÆLARAR

Jens Erik Rasmussen	FS Vágar
John Petersen	GÍ
Uni Arge	HB
Kurt Mørkøre	KÍ
Jan Allan Müller	Esbjerg Boldklub
Todi Jónsson	Lyngby FC

LANDSDYSTIR EFTIR AT SPÆLA Í 1996

31. august	Føroyar-Slovakia	HM
4. september	Føroyar-Spania	HM
6. oktober	Føroyar-Jugoslavia	HM
23. oktober	Slovakia-Føroyar	HM

NSÍ FEKK HEVND

Runavíkingar stýrdu dystinum, og vunnu tryggan sigur á Sumba

2. deild menn:
NSÍ-Sumba 5-1 (3-1)

Runavíkingar vóru, sum úrslitið eisini sigur, ruddiliga omaná, tá sumbingar vóru á vitjan í Runavík.

Síðani Sumba í fyrsta umfarinum í landskappingini legði fót fyri NSÍ suðuri á Krossinum, hava teir í NSÍ brent eftir at fáa hevnd fyri javnleikin. Og tað fingu teir leygardagin!

Fimm ferðir sendu teir bóltin í Sumba-málið, teir spældu til tíðir sannførandi, og høvdu allatíðina initiativið og myndugleikan í dystinum. Tíðliga í dystinum legði Sjúrður Jacobsen, sum er besti málskjúttin hjá NSÍ í ár, vertirnar á odda eftir langt innkast frá Oddfríði Gaardbo, sum Arnfinn Langgaard longdi til aftaru stong. Sjúrður skuldi so bara seta høvdið á og í málið.

NSÍ økti við brotssparkið, tá Jónstein Petersen varð feldur í brotsteiginum, og tryggi skjúttin Kári Hansen sendi í málið.

Løtu seinni fingu sumbingar brotssparkið (runavíkingur hildu talan vera um forering), tá Jan Poulsen og NSÍ-málverjin Meinhard Poulsen vóru í nærdysti. René Thomsen, sum eisini er tryggur brotssparksskjútti, sparkaði í málið til 2-1.

Sumbingar hóttu við at taka seg um reiggj, men tað bleiv ikki til meira enn tankan, og tá Kári Hansen økti til 3-1 stutt fyri hálvleikin, var dysturin í royndi og veru avgjørdur.

Í seinna hálvleiki helt NSÍ fram við at trýsta sumbingar, og hóast spælið ikki altíð var so flótandi, sum teir kundu ynskt sær, so var eingin ivi um hvat var betra liðið.

Sumbingar royndu seg nakrar ferðir við innleggum til Jan Poulsen, men einki spurdist burtur úr tí.

Óli Hansen legði NSÍ fram um 4-1, tá hann fekk bólt frá Abraham Hansen, og stutt eftir varð málverjin hjá Sumba rikin av vøllinum, tá hann gjørdi seg inn á NSÍ-spælara. Marlon Kjærbo fór í handskarnar, og hann stóð seg væl, og fordaði fleiri ferðir NSÍ-arunum at gera mál.

Men hann kundi ikki verja fyri skotinum hjá innskifta Eddie Mikkelsen, tá hann royndi eg úr spiskum eftir bólt frá Abraham, sum Sjúrður longdi.

Við einum nakað meira rutineraðum liði enn tí, teir brúktu undan summarsteðginum, vann NSÍ stórsigur á Sumba, og setti kós móti oddinum í 2. deild, og einum plássið í 1. deild komandi ár.

(ek)



AVSTAÐ Í DAG

Mansunglingarnir í flogbólti fara til NM kapping í Svøríki

Í dag fara mansunglingarnir í flogbólti avstað til Svøríki, at luttaka í Norðurlandameistaraskapinum í flogbólti.

Liðið flýgur við Atlantsflog til Keypmannahavn og hiðani til Falkøping í bussi.

Kappingin verður í døgunum frá 16. til 18. august, og Føroyar eru í bólki saman við Finlandi og Danmark.

10 spælarar eru við á føroyska liðnum. Teir eru: Gunnar Joensen og Hjalmar Joensen úr Nøvuni, Jan Aki Olsen úr ÍF, Rúni Elttør úr Mjølnir, Tórur Andreasen úr Fleyt, og David Davidsen, Finnur Justinussen, Bárður Mikkelsen, Jóhann Nielsen og Rúni Weihe úr Fram.

Venjari hjá liðnum er Jákup Sørensen.

ek